# Vegleiðing til stroyma.fo

Vælkomin til Stroyma. Fylg mannagongdini, sum er lýst niðanfyri. Teigar, ið hava eina stjørnu (*), eru kravdir teigar.

Far inn á stroyma.fo og rulla oman til niðast á síðuni. Í høgra horni sært tú funkuna “Rita inn/Skráset brúkara”. Trýst á hana og ger ein brúkara. Lættast er at gera brúkara við Google ella Facebook. Tá tú ert ritað/ur inn, skalt tú trýsta á “Upload New Video”.

Filmurin skal leggjast út í HD, FHD ella QHD (2K). Set teg í samband við Filmshúsið, um tú vilt leggja út í 4K.

***Vel ein flokk***

- Stuttfilmur er ein fiktiónsfilmur á 30 min. ella styttri.
- Animatión og listafilmar verða flokkaðir sum stuttfilmar (um hesir eru styttri enn 30 min.)
- Fiktiónsfilmar, sum eru longri enn 30 min., verða flokkaðir sum spælifilmar.
- Stuttur heimildarfilmur er heimildarfilmar styttri enn 30 min.
- Longri heimildarfilmur er heimildarfilmar longri enn 30 min.

***Aldursmark***

Vel ein av fýra bólkunum:

- Hóskandi til øll
- Frámælt børnum undir 7 ár
- Hóskandi til børn 11 ár og eldri
- Hóskandi til børn 15 ár og eldri

## ***Grundupplýsingar***

***Heiti***

Skriva føroyska og enska heitið á filminum.

***Logline og synopsa***

“Stuttur søgusamandráttur” er ein logline við í mesta lagi 200 teknum.

“Um filmin” er ein synopsa við í mesta lagi 600 teknum.

Gevið gætur, at hesi skulu skrivast á bæði føroyskum og enskum.

***Myndir***

Plakat er forsíðumyndin, ein portrettmynd, sum er standandi.

Stillmyndin er ein liggjandi mynd í 16:9.

Støddarmarkið á fíluni er 10 MB og loyvdu formatini eru JPEG (.jpg og jpeg), PNG (.png) og WebP (.webp).

***Undirtekstir***

Til ber at leggja upp undirtekstir á fleiri málum. Legg upp .srt fíluna og vel mál. Trýst á “+ Legg afturat undirtekstir” fyri at leggja fleiri aftrat.

Í teiginum undir skal tú skriva hvørji mál undirtekstirnir eru t.d. “Føroyskar, enskar, danskar”. Eru eingir, noyðist tú ikki at skriva nakað í teigin.

***Liðið***

Her verða nøvnini á filmsliðnum sett inn.

***Sýningar og virðislønir***

Her ber til at fylla út, um filmurin hevur verið vístur á filmsfestivalum. Eisini ber til at viðmerkja, um hann vann nakra virðisløn. Man kann í mesta lagi skriva seks festivalar.

***Framleiðsla***

Skriva framleiðslufelag og møguligt samframleiðslufelag.

***Tøkniligar upplýsingar***

Skriva longd, mál og framleiðsluár.

***Leinki til IMDb***

Hetta er til IMDb vangan hjá filminum.

***Kostnaðurin***

Kostnaðurin á filminum er mettur út frá, hvussu gamal filmurin er. Framleiðarin/ábyrgdarfólkið kann til eina og hvørja tíð avgera, um filmurin skal vera ókeypis.

Felagið Føroysk Filmsfólk og stýrið fyri Filmshúsið hava í felag avgjørt ein vegleiðandi kostnað. Til ber at áseta ein serstakan kostnað, um tað er neyðugt. Prísurin er íroknaður mvg og harumframt fer ein partur av kostnaðinum til at hýsa skipanini og til tænastuveiting.

***Bankaupplýsingar***

Fyll inn bankaupplýsingar.

***Distributión***

Tað ber til at geoblokera filmin, um hann bara skal kunna síggjast í Føroyum. Set kross við, um tú ynskir hetta.

***Váttan um rættindi***

Niðast á síðuni skalt tú vátta, at tú hevur fullan rætt at leggja filmin út og hevur fingið til vega øll neyðug rættindi.

| | |
|---|---|
| **FLOKKUR:** * **(set X)** | |
| Heimildarfilmur | |
| Stuttfilmur | |
| Spælifilmur | |
| | |
| **ALDURSMARK (set X)** | |
| Hóskandi til øll | |
| Frámælt børnum undir 7 ár | |
| Hóskandi til børn 11 ár og eldri | |
| Hóskandi til børn 15 ár og eldri | |
| | |
| **GRUNDUPPLÝSINGAR** | |
| Føroyskt heiti: * | |
| Enskt heiti: * | |
| Stuttur søgusamandráttur (logline) **á føroyskum**: * (í mesta lagi 200 tekin) | |
| Søgusamandráttur **á enskum**: * (í mesta lagi 200 tekin) | |
| Um filmin (synopsa) **á føroyskum**: * (í mesta lagi 600 tekin) | |
| Um filmin **á enskum**: * (í mesta lagi 600 tekin) | |
| Undirtekstir: * | |
| | |
| **FILMSLIÐ** | |
| Leikstjóri: * | |
| Handritahøvundur: * | |
| Framleiðari: * | |
| Filmsfotografur: * | |
| Klippari: * | |
| Tónaskald: * | |
| Høvuðsleikarar: * | |
| Aðrir lyklapersónar á filmsliðnum: (navn og leiklutur: *Peter Petersen, ljóðsniðgevi*) | |

| | |
|---|---|
| **SÝNINGAR OG VIRÐISLØNIR**<br>**(í mesta lagið upp í 6)**<br><br>(Festivalur, býur, land, ár og møgulig virðisløn: *Geytin, Tórshavn, Føroyar, 2025, Áskoðaraviðislønina)* | |
| 1. | |
| 2. | |
| 3. | |
| 4. | |
| 5. | |
| 6. | |
| **FRAMLEIÐSLA** | |
| Framleiðslufelag: * | |
| Samframleiðslufelag: | |
| **Tøkniligar upplýsingar** | |
| Longd: * (tímar, minuttir) | |
| Mál: * | |
| Framleiðsluár: * | |
| Leinki til IMDb: * | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **KOSTNAÐUR *** | **Aldur** | **Prísur** | **Set X ella skriva upphædd** |
| **STUTTFILMAR** | Yngri enn 3 mðr. | 29,- DKK | |
| | Yngri enn 1 ár | 19,- DKK | |
| | Yngri enn 4 ár | 7,- DKK | |
| | Eldri enn 4 ár | 0,- DKK | |
| | Onnur upphædd | __,- DKK | |
| | | | |
| **SPÆLIFILMAR** | Yngri enn 2 ár | 59,- DKK | |
| | Eldri enn 2 ár | 39,- DKK | |
| | Onnur upphædd | __,- DKK | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **STUTTIR HEIMILDARFILMAR (upp til 30 min.)** | Yngri enn 1 ár | 19,- DKK | |
| | Yngri enn 4 ár | 7 ,- DKK | |
| | Eldri enn 4 ár | 0,- DKK | |
| | Onnur upphædd | __,- DKK | |
| | | | |
| **LONGRI HEIMILDARFILMAR (longri enn 30 min.)** | Yngri enn 2 ár | 59,- DKK | |
| | Yngri enn 4 ár | 39,- DKK | |
| | Eldri enn 4 ár | 0,- DKK | |
| | Onnur upphædd | __,- DKK | |
| | | | |
| **SJÓNVARPSRØÐIR (fyri hvønn part)** | Fyri hvønn part | 29,- DKK | |
| | Onnur upphædd | __,- DKK | |
| | | | |
| **BANKA-UPPLÝSINGAR** * | **Banki** | **Skrás. nr.:** | **Kontunr.:** |
| | | | |
| **LANDA-BLOKERING** (**set X** um tú ynskir at filmurin bert skal kunna síggjast úr Føroyum) | | | |